## Nýggj høll á Tvøroyri til sløkkiliðið



Nú er ætlanin at sløkkiliðið fyri Tvøroyrar kommunu og Hvalbiar kommunu skal fáa betri sømdir. Á fíggjarætlanini fyri næsta ár, ætlar Tvøroyrar Kommuna at seta 1 millión krónur av til eina nýggja høll til sløkkiliðið. Tvøroyrar kommuna og Hvalbiar kommuna samstarva um sløkkiliðið og høllin verður sostatt bygt saman við hvalbingum. Høllin skal byggjast upp á Drelnesi, har Tvøroyrar kommuna frammanundan hevur stórt, slættað økið klárt

## Hava longu keypt fyrstu jólagávurnar

Tveir av hvørjum 10 norðmonnum eru longu farnir til handils at leita eftir jólagávum, vísir ein nýggja kanning. Tað hendir, hóast hálvur triði mánaður er til jóla. Kvinnurnar eru skjótari enn menninir at gera jólahandilin. Men ídnast eru kortini tey ungu. Fjórða hvør norsk kvinna byrjaði jólahandil sín áðrenn fyrstu vikuna í oktober mánaði, vísir ein kanning sum Infact hevur gjørt fyri norska blaðið VG. Fleiri enn triðingurin av teimum, sum siga seg longu hava keypt jólagávur, er millum 18 og 24 ár, meðan meiri enn helmingurin av teimum longu eru farin til handils er undir 40 ár. Norðlendingar og fólk í Trøndelag eru fyrst úti at byrja keypið av jólagávum.

# Nú verður Sandslíð gjørd tryggari



*Vegurin gjøgnum Sandslíð er millum teir elstu í landinum. Tíðarinnar tonn hevur eisini "koyrt" eftir hesum vegnum*

*Mynd: Oskar Oskarsson*

Í longri tíð hava nógv fólk borið ótta fyri at koyra gjøgnum Sandslíð og til bygdirnar eystanfyri á Sandoynni.

Nú eru menn frá Articon farnir undir at umvæla eitt ávíst petti, har vegurin var skrædnaður nakað undan.

Tá hetta arbeiðið er liðugt, verður tryggari hjá fólki at koyra aftur.

Kortini eru mong sum leingjast eftir eini endaligari loysn á vegasambandinum eystureftir. Hetta gerst best við einum tunli. Nær hann kemur, tað er ilt at meta um.

**sb.**

## Ungdómur á Tvøroyri fær hús

Nú er ætlanin at ungdómurin á Tvøroyri skal fáa sítt egna hús at húsast í. Tvøroyrar Býráð ætlar at seta pening av til endamálið at fíggjarætlanini fyri næsta ár. Fyribils eru 1,1 millión krónur sett av til ungdómshús á Tvøroyri, men tann upphæddin verður so dagførd so hvørt, tað verður greitt, hvussu nógv um pengum tørvur er á. Ungdómshúsið verður í hølum hjá Thomsen niðri á bryggjuni og tað er eitt ár síðani, at býráðið gjørdi avtalu við eigararnar um at leiga høli til ungdómshús í einum húsi hjá Thomsen. Í næstu framtíð skal søkjast eftir leiðara til ungdómshúsið. Ætlanin er at seta leiðaran sum skjótast so at hann kann vera við til at leggja virksemið til rættis og í løtuni verður arbeitt við at innrætta hølini.

## Spennandi stundir á Sunda bókasavni

Virksemið hjá Sunda bókasavni er nú byrjað aftur eftir summarsteðgin. Fyrst tiltakið hevur longu verið, og tað næsta verður mikukvøldið 24. september.

Tiltøkini verða hildin eina ferð um mánaðin, og verða nógv áhugaverd evni tikin fram.

Á komandi tiltakinum verður tosað um gamlar myndir. Nógvar slíkar finnast á bókasavninum, og her kunnu fólk fáa høvið at tosa um tær og møguliga eisini seta nøvn á persónarnar á teimum.

Á skránni í vetur eru mong áhugaverd evni. Millum annað verður tosað um haruna og bibliusøgur, eins og tey fáa vitjan av sangskrivaranum Martini Joensen, sjónleikaranum Eyð Matras og Sølva Reinert Hansen sum fer at tosa um at seta sær mál í lívinum og at røkka teimum.

- Hesi tiltøkini eru við til at menna bókasavnið. Fólk hava fingið eyguni upp fyri, at bókasavnið er eitt livandi stað og ikki bert eitt rúm við nøkrum hillum við bókum.

- Vit kunnu bara staðfesta, at meiri lívi er komið í bøkurnar, verður sagt úr Sunda bókasavni.

**sb.**

## Toftafólk upp í norðurlendsk umhvørvi

Á seinasta bygdaráðsfundi í Nes kommunu varð samtykt at gerast partur av einum norðurlendskum samstarvi innan umhvørvi.

Talan er um eitt samstarv innan tað, tey nevnda biologiskt margfeldi, og er eitt samstarv sum Agenda 21-stovan stendur fyri.

Samstarvið er millum fleiri kommunur í Norðurlondum – í Svøríki, Danmark, Finlandi, Íslandi og Noregi.

Nú er Nes kommuna vorðin partur av hesum við einum prosjekti um Toftavatn, har Runavíkar kommuna eisini er partur av. Prosjektið ber heitið "Toftavatn – náttúra, uppliving og trivnaður".

Endamálið við ætlanini er at verja margfeldið við vatnið. Eitt av arbeiðunum er at gera rásir kring vatnið og at seta upp kunnandi skelti um náttúrina, søguna og lívið her.

**sb.**

## Krevja gjøllari pínugransking

**Norðurlendsku giktfeløgini krevja gjøllari pínugransking, har sjúklingurin verður settur í miðdepilin**

GIKT

*Tíðindaskriv*

Tey norðurlendsku giktfeløgini hava herfyri – við Gigtarfélag Íslands sum verti – verið saman til eina tvørfakliga ráðstevnu í Reykjavík. Ráðstevnan, REUMA 2007, vendi sær til allar fakbólkar, sum hava tilknýti til tannn giktsjúka: reumatologar, sjúkrasystrar, fysio- og ergoterapeutar, psykologar, sosialráðgevar o.o.. Temaið á ráðstevnuni var: Meiri vitan, betri viðgerð og betri lívsvirði.

Nakrir av fyrilestrunum á REUMA 2007 løgdu mesta dentin á gransking av pínu og pínuviðgerð – og í hesum høpi frágreiðingar frá fólkum við gikt, og so royndir hjá serfrøðingum í samband við teirra arbeiði við giktsjúklingum. Undirstrikað varð at hava eina heildarmynd av tí pínuviðgerð, sum hin einstaki giktsjúki hevði tørv á.

Í Nordisk Reumaråd (NRR) – felagsskapur fyri øll giktfeløg í Norðurlondum, umboðandi umleið 3 mió. menniskju – er semja um, at tað er stórur tørvur á einum miðvísum, alment fíggjaðum granskingararbeiði, sum kann avdúka, hvussuleiðis pína í rørslulagnum av fyrstan tíð kemur í, og soleiðis finna nýggjar leiðir til viðgerð av pínuni. Ráðið leggur dent á, at granskingin verður tvørfaklig, soleiðis at mann tryggjar, at viðgerðin ikki bert tekur støði í sjálvari sjúkuni, men eisini tekur atlit til støðuna og resursurnar hjá tí einstaka sjúklinginum.

NRR heldur, at tíðin er búgvin til nýggj sjónarhorn viðvíkjandi pínuviðgerð av rørslulagnum. Liða-og vøddapína darvar gerandisdegnum hjá menniskjum í millíónatali – bert í Norðurlondum. Men hóast hetta, verður ikki nógv granskað. Brúk er fyri menning – og fyri atgongd, sum ikki ber brá av einoygdum fokus upp á sjúkdómin, men sum í nógv størri mun setir sjúklingin í miðdepilin.